# Kemur ikki upp á tal at flyta út á bygd

**Verður hildið fast um kravið at Barnaverndarstovan skal flytast út á bygd, fer samstarvið at slitna**

BARNAVERNDARSTOVAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Húsið, har Barnaverndarstovan skal verða í Havn,verður umvælt. Tað er eitt ófrávíkiligt krav, at hon verður verandi í Havn, annars verður samstarvið slitið*

– Tað kemur ikki upp á tal at flyta Barnaverndarstovuna út á bygd.

Tað ger Heðin Mortensen púra greitt.

Umframt at verða borgarstjóri í Havn, er Heðin Mortensen eisini næstformaður í Kommunusamskipan Føroya.

Mánadagin skrivaðu vit í Sosialinum, at tað var so stór ósemja ímillum kommunurnar um, hvar Barnaverndarstovan skuldi vera, at vandi var fyri, at samstarvið slitnaði.

Tær seks býarkommunurnar, sum eru limir í Kommunusamskipan Føroya, hava sett sum ófrávíkiligt krav, at Barnaverndarstovan skal vera í Havn.

Hetta góðtaka tær 28 kommunurnar í Kommunufelag Føroya ikki. Kommunufelagið vil tí hava, at Barnaverndarstovan verður flutt út á bygd.

Sostatt hevur Kommunufelagið mælt limakommununum til at krevja, at sáttmálin um Barnaverndarstovuna verður endurskoðaður sum skjótast. Men vilja býarkommunurnar ikki samráðast um at flyta Barnaverndarstovuna út á bygd, mælir stýrið fyri Kommunufelagið til, at sáttmálin verður uppsagdur.

Slitnar samstarvið, kann tað henda, at tað verða tvær Barnaverndarstovur í Føroyum, ein fyri tær seks býarkommunurnar og ein fyri tær 28 kommunurnar í Føroya Kommunufelag.

### Kann bara vera í Havn

Rodmundur Nielsen, formaður í Kommunusamskipan Føroya hevur als ongar viðmerkingar yvirhøvur.

Men tað hevur Heðin Mortensen.

Og hann ger púra greitt, at samstarvið um Barnaverndarstovuna skal fyrr slitnað, heldur enn at hon verður flutt út á bygd.

– Hjá honum er onki ivamál um, at Stovnurin kann ikki vera aðrastaðni, enn í Havn.

– Tórshavnar kommuna er tann einasta, sum hevur serfrøði á økinum og sum hevur havt umsiting á økinum í eitt langt áramál. Tí hava vit bjóðað okkum til at hjálpa til at fáa Barnaverndarstovuna á føtur.

Hann vísir eisini á, at Kommunusamskipanin hevur keypt hús í Havn til kommunala umsiting

– Alt, sum hevur við økkara umsiting at gera, er undir sama taki og tí er tað burturvið at gera eina nýggja umsiting, bara fyri at Barnaverndarstovan ikki skal vera í Havn.

Fakliga er tað eisini ein styrki, at umsitingin er savnað og tað tænir ongum endamálið at tæga hana sundur, tí tað ger hana veikari.

Kann Kommunufelagið ikki liva við tí, harmar tað Heðin Mortensen.

Men hann er ikki til at vika á hesum øki.

– Vit betala gildi og tí vilja vit eisini hava eitt orð at siga, og av praktiskum orsøkum, liggur Barnaverndarstovan best í Havn, saman við allari hinari umsitingini hjá Kommunusamskipanini.

Hann er heilt ósamdur um, at Barnaverndarstovan skal vera úti á bygd fyri at eisini bygdirnar kunnu fáa lut í tryggum almennum lønum.

Í hesum sambandi vísir hann á, hvussu nógv fólk av bygd koma til Havnar hvønn dag til arbeiðis so bygdirnar fáa eisini sín part av einum almennu lønunum.

– Tað hava vit als onki ímóti, men tað er ov stuttskygd bara at krevja alt úr Havnini, leggur hann afturat.

# Vóru seks ímóti einum

**Eftir at hava fingið eitt ófrávíkiligt krav, atkvøddu seks av sjey limum í stýrinum fyri Kommunufelag Føroya fyri at leggja Barnaverndarstovuna í Havn**

BARNAVERNDARSTOVA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var á stýrisfundi í Kommunufelagnum tann 14. september, at Kommunufelagið góðtók at Barnaverndarstovan verður løgd í Havn – í hvussu so er fyribils.

Tað sæst á frágreiðing frá fundinum, at tað er ikki semja ímillum Kommunufelagið og Kommunusamkipanuna um, hvar Barnaverndarstovan skal vera.

Tað stendur eisini í fundarfrágreiðingini, at stýrið í Kommunufelagnum er samt um, at tað kann ikki góðtaka, at kommunalir stovnar, sum Barnaverndarstovan, verða miðsavnaðir.

Í hesum sambandi høvdu tveir borgarstjórar í Eysturoy, Rodmund Nielsen í Runavík og Sigurd Simonsen í Fuglafirði biðið um at sleppa á fund í stýrinum hjá Kommunufelagnum at umrøða Barnaverndarstovuna.

Rodmundur Nielsen er formaður í Kommunusamskipan Føroya og Sigurd Simonsen er stýrislimur.

Á fundinum bjóðaðu teir skrivstovuna hjá Kommunusamskipanini í Havn fram at hýsa Barnaverndarstovuni.

Ført varð eisini fram, at tað var eitt ófrávíkiligt krav at Barnaverndarstovan skal vera í Havn.

Tað endaði við, at seks limir í stýrinum fyri Kommunufelagið atkvøddu fyri at leggja Barnaverndarstovuna í Havn og bara Jóhan Christiansen atkvøddi ímóti.

Men sáttmálin um Barnaverndarstovuna skal endurskoðast longu næsta ár og tað er í hesum sambandi, at stýrið fyri Kommunufelagið hevur mælt limakommununum til at siga sáttmálan upp, vil Kommunusamskipan Føroya ikki samráðast um at flyta Barnaverndarstovuna út á bygd.

## Bíða bara eftir at onkur í landsstýrinum rópar bingo

**Landsstýrið sleppur ikki at renna runt við Tórshavnar Kommunu, er tann heilt greiði boðskapurin hjá borgarstjóranum í Havn**

BARNAVERNDARØKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit bíða bara til onkur í landsstýrinum rópar bingo!

Borgarstjórin í Havn er ógvuliga misnøgdur við framferðina hjá landsstýrinum, nú ætlanin er at fáa kommunurnar at yvirtaka barnaverndarøkið.

Og tá ið Heðin Mortensen heldur turrisliga sigur, at hann bara bíðar eftir, at onkur í landsstýrinum rópar bingo, meinar hann við, at hann bíðar eftir eini fráboðan úr landsstýrinum.

– Men tað skal vera ein klokkuklár fráboðan, tí einki annað verður góðtikið, sigur hann.

### Skal ikki kosta skattaborgarunum eitt oyra

Landsstýrið hevur boðað frá, at tað skal ikki merkjast á skattarokningini hjá fólki, at kommunurnar nú skulu umsita alt barnaverndarøki, sum hevur ligið undir landinum higartil.

Skulu kommunurnar yvirtaka barnaverndarøki, fer tað at kosta kommununum nógvar milliónir. Men landsstýrið hevur lovað, at landsskatturin skal lække, so at kommunurnar kunnu hækka kommunuskattin og sostatt skal skattaborgarin onki merkja til at barnaverndarøkið verður lagt undir kommunurnar.

Men tað er akkurát her, at Heðin Mortensen heldur, at landsstýrið hevur svikið so dyggiliga.

– Hóast kommunurnar eru í ferð við at leggja fíggjarætlanir fyri komandi ár, hava vit enn ikki hoyrt eitt orð úr landsstýrinum um, at ætlanin er at lække landsskattin, so at kommunurnar kunnu yvirtaka barnaverndarøkið, uttan at samlaða skattatrýstið økist.

Men borgarstjórin slær samstundis rimmarfast við sjeytummaseymi, at skattatrýstið á borgaran í Havn skal ikki økjast eitt tveyoyra fyri tað um kommunurnar nú skulu yvirtaka barnaverndarøkið.

– Vit hava mett, at tað fer at kosta Tórshavnar Kommunu 16 milliónir at yvirtaka alt barnaverndarøkið frá landinum.

– Men fer landsstýrið ikki at lække landsskattin, so at landsskatturin í Havn lækkar 16 milliónir, fara vit rætt og slætt at nokta fyri at yvirtaka barnaverndarøkið.

– Fylgir peningur ikki við, vilja vit ikki hava barnaverndarøkið, tí so skal landið sleppa at eiga tað!

### Seta ongar pengar av

Tórshavnar Kommuna er annars í ferð við at leggja fíggjarætlanina fyri næsta ár. Hon javnvigar við 493 milliónum. Fyrsta viðgerð hevur verið og tað skulu ganga minst 14 dagar, áðrenn onnur viðgerðin kann vera og fíggjarlógin verður endaliga samtykt.

Sostatt er ikki øll verðsins tíð. Men til vit fáa eina klokkuklára fráboðan úr landsstýrinum, arbeiða vit sum um at onki er hent og at landsstýrið eisini næsta ár skal umsita barnaverndarøkið.

– Sostatt ætla vit ikki at seta eitt oyra av á fíggjarlógini til barnaverndarøkið. Tað gera vit ikki, fyrrenn vit fáa greitt at vita frá landsstýrinum, at landskatturin verður lækkaður, so at borgararnir í Havn koma at betala 16 milliónir minni í landsskatti. Tá ið vit hava fingið ta fráboðanina, kunnu vit seta 16 milliónir afturat av á fíggjarlógini til barnaverndarøkið, sigur Heðin Mortensen.

– Men tað verður heldur ikki fyrr, leggur hann afturat, tí nú skal landsstýrið vísa í verki, at tað stendur við lyftið um at skattabyrðan skal ikki økjast, hóast barnaverndarøkið nú verður lagt undir kommunurnar.

Hann sigur, at krevur landsstýrið, at kommunan skal yvirtaka barnaverndarøkið, uttan at veita fult endurgjald í landsskattinum, skal Løgtingið sleppa at kroysta tað niðuryvir kommuna við eini lóg, tí sjálvboðin gera vit tað ikki, slær borgarstjórin fast.